

*Ljóðið á Summar Festivalinum um vikuskiftið verður tað størsta og besta í Føroyum nakrantíð. Nógv eykaútgerð verður flogin inn til festivalin*

# Atlantsflog tryggjar størsta festivalljóðið nakrantíð

**Stóru altjóða nøvnini, sum koma at spæla á Summar Festivalinum, seta stór krøv til ljóðútgerðina, og í ár skal Atlantsflog flúgva eyka útgerð inn, so at talan verður um størsta og besta festivalljóðið í Føroyum nakrantíð**

SUMMAR FESTIVALUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ljóðið á Summar Festivalinum verður nakað heilt serligt.

Nógv eykaútgerð verður leigað uttanlands afturat tí stóru rúgvuni, sum finnist í Føroyum, og samanlagt verður talan um størsta festivalljóðið nakrantíð í Føroyum.

– Tað eru tvær orsøkir til, at nógv eykaútgerð verður leigað í ár. Onnur er, at stóru útlendsku bólkarnir krevja stórt ljóð, og hin er, at vit vilja gera betri ljóð til ein størri part av festivaløkinum, sigur Hans Andor Johannesen, sum hevur ábyrgdina av ljóðinum á Vágsbøi, har stórur konsertirnar á Summar Festivalinum verða hildnar.

– Í ár kunnu vit bjóða bæði betri og harðari ljóð, og talan verður um næstan tvífalt so stórt ljóðanlegg, sum vit brúktu á Summar Festivalinum í fjør.

### Atlantsflog spennir seg út

Tað er ikki bara sum at siga tað at leiga ljóðútgerð av hesum slagnum uttanlands, og tað hevði ikki borið til hjá Summar Festivalinum at bygt ljóðanleggið út, um ikki føroyska flogfelagið Atlantsflog var við í ætlanini.

Atlantsflog spennir seg rættiliga út í sambandi við ljóðanleggið á Summar Festivalinum og flýgur eina rúgvu av útgerð heim úr Danmark beint undan festivalinum og avstað aftur eftir festivalin.

– Vit hava eitt slogan sum sigur, at tað skal verða stuttligari at búgva í Føroyum. Festivalarnir hava fingið stóran týdning fyri samfelagið, og vit vilja í verki virka fyri, at festivalarnir fáast at rigga væl, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi.

– Í hesum førum flúgva vit ljóðútgerð heim, so at teir størstu útlendsku bólkarnir kunnu koma hendan vegin at spæla.

– Tað er umráðandi, at føroyingar hava góðar møguleikar at sleppa út í heim, men tað er eisini týdningarmikið, at vit kunnu lokka kendar bólkar og persónar til Føroya. Tað er gott fyri trivaðin í Føroyum, sigur Magni Arge.

### Ljóð til 10.000 fólk

Millum útlendsku bólkarnar, sum sleppa at spæla ígjøgnum tað útbygda ljóðanleggið, eru David Phelps, Johnny DeLuxe og ikki minst The Rasmus, sum hevur sett stór krøv til støddina á anlegginum.

Talan verður tí um eitt rimmar rockbrak, tá ið The Rasmus fer at spæla á Summar Festivalinum fríggjakvøldið.

– Ljóðið á Summar Festivalinum í ár er gjørt til at kunna spæla fyri umleið 10.000 fólkum, sigur Hans Andor Johannesen, leiðandi tøkningur.



*Stjórin á Atlantic Airways dylur ikki fyri, at eisini tey síggja stórt virði í stóru festivalunum, sum hava tikið seg upp í Føroyum*

## STUTT SAGT

### The Rasmus endar langt burturi

Tá rockbólkurin The Rasmus kemur til Føroya at spæla á Summar Festivalinum fríggjakvøldið, verður tað ein av seinastu konsertunum á verandi konsertferð, sum hevur vart mest sum eitt heilt ár.

Eftir framførsluna í Klaksvík skal The Rasmus spæla konsertir í londum sum Finlandi, Belgia, Ungarn og Kekkia, og konsertferðini hjá teimum endar við eini konsert í Dominikanska Lýðveldinum tann 19. august.

**-mørk**

### Hogdson heiðraður

ASCAP, sum er ein stytting fyri The American Society Of Composers, Authors and Publishers var sett á stovn í New York City hin 13.februar í 1914.

Endamálið hjá felagsskapinum er at taka sær av upphavsrættindum og fíggjarviðurskiftum hjá eitt nú tónaskøldum. Ein av uppgávunum hjá stovninum er at fylgja við hvussu ofta løg verða spæld í útvarpi og sjónvarpi, umframt at tryggja sær at royalties(lønir) koma á rætta stað.

Árliga afturvendandi heiðurstiltakið hjá ASCAP varð hildið seinasta mei mánaða. Sonevnda POP virðislønin varð í ár latin Roger Hodgson, fyrrverandi oddamanni og høvuðssangskrivara í enska bólkinum Supertramp, fyri lagið Give A Little Bit. Orsøkin til hetta er, at sangurin var ein hin mest spældi á yvirlitinum hjá ASCAP fyri árið 2005.

**-mørk**

### Lena fer til Póllands

Ætlanin var, at Lena Andersen skuldi spæla á Summar Festivalinum í ár, men hon hevur givið avboð, tí hon hevur fingið møguleikan at spæla á stórum festivali í Póllandi um sama mundið.

– Tí verður Lena ikki við á Summar Festivalinum 2006, men vit vóna, at hon hevur møguleikan at vera við seinni. Lena er ein av føroysku tónleikarunum, sum veruliga satsar í útlandinum, og nú hon fekk ein frálíkan møguleika at spæla á einum stórum festivali uttanlands, var einki at siga til, at hon vildi taka av hesum møguleika. Summar Festivalurin ynskir henni alt tað besta á ferðini til Póllands, skrivar Summar Festivalurin á sínari heimasíðu

**-mørk**